# Byggja nýggjan timburhandil á Kambsdali fyri 7 miljónir krónur

**Stjórin í Havnar Timburhandli, Heini Fossaa, dylur ikki, at undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfirði hevur havt týdning í avgerðini at byggja nýggjan timburhandil á Kambsdali**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Seks fólk eru knýtt at Timburhandlinum, sum er á Kambsdali, og tá ið nýggi bygningurin letur upp tíðliga í heyst, verður talið av arbeiðsfólki á leið tað sama, sigur Heini Fossaa, stjóri í Havnar Timburhandli*

Havnar Timburhandil er nú farin undir at byggja nýggjan timburhandil á ídnaðarøkinum á Kambsdali. Heini Fossaa, stjóri, væntar, at bygningurin stendur fullreistur, tá ið henda vikan er liðug. Ætlandi verður nýggi timburhandilin liðugur at taka í nýtslu beint eftir summarfrítíðina ella tíðliga í september. Plássið inni í hitanum, tey rópa, verður einar 500 fermetrar; har verður vørusøla, skrivstovur, kaffistova og aðrir fasilitetir til starvsfólkið. Sjálv timburgoymslan verður 1100 fermetrar, og á økinum uttanum bygningin verða einir 2000 fermetrar planeraðir til goymslu av tilfari og tænastu til viðskiftafólkini, sum vitja handilin.

Heini væntar, at samlaði kostnaðurin av byggingini og planeringini av økinum uttan um fer at kosta einar 6-8 miljónir krónur.

### Síðan 1989

Tað var í 1989, at Havnar Timburhandil keypti Snikkaravirkið á Kambsdali. Tey fyrstu árini helt virksemið, sum var í bygninginum, fram á sama hátt sum frammanundan við vindeygum, hurðum og øðrum.

– Men í 1993 avgjørdu vit at niðurleggja snikkaravirksemi og lata eina timburdeild við byggimarknaði upp.

Heini sigur, at seinastu 10 árini hevur timburhandil og byggimarknaður verið í bygninginum, og hetta virksemið fer at halda fram, til nýggi timburhandilin verður tikin í nýtslu tíðliga komandi heyst.

– Tað, sum vit nú gera, er at bøta um viðurskiftini hjá okkara arbeiðsfólki og okkara viðskiftafólkum. Í nýggja bygninginum verða arbeiðsumstøðurnar nógv betur; har verið minni handfaring av tilfari, og bæði timburgoymslan og vørugoymslan annars verða nógv størri og breiðari enn higartil.

Heini vísir á, at gamli bygningurin er ikki serliga væl egnaður til timburhandil, tí goymsluplássið er alt ov lítið.

– Í nýggja bygninginum verður ríkiligt av plássi, bæði inni og úti.

Hann vísir á, at Havnar Timburhandil fer at snøgga økið uttan um bygningin, soleiðis at tað verður reint og nossligt, tá ið handilin letur upp.

### Tunnilin týdning

Heini dylur ikki, at tað hevur týdning fyri avgerðina at byggja nýggjan timburhandil á Kambsdali, at tunnilin undir Leirvíksfirði nærkast.

– Jú, tað er so avgjørt, at vit høvdu hetta frambrot á samferðsluøkinum í huganum, nú vit tóku støðu til byggingina.

Seks fólk eru knýtt at Timburhandlinum, sum er á Kambsdali, og tá ið nýggi bygningurin letur upp, verður talið av arbeiðsfólki á leið tað sama.

Heini Fossaa sigur, at Fuglafjarða kommuna hevur yvirtikið verandi bygning hjá Havnar Timburhandli á Kambsdali.

– Tað er soleiðis, at gamli bygningurin liggur uttanfyri ídnaðarøkið á Kambsdali, og skúlar liggja ímillum ídnaðarøkið og hendan bygningin. Vit ætlaðu at byggja verandi bygning út, men við tað, at hesin liggur uttanfyri ídnaðarøkið, spurdi Fuglafjarða kommuna okkum, um vit ikki heldur kundu koma ásamt um eina aðra loysn, har vit bygdu ein nýggjan bygning, og Fuglafjarða kommuna yvirtók verandi bygning.

Heini Fossaa sigur, at hetta gjørdist loysnin, og hann fegnast um, at nýggi timburhandilin nú stendur fullreistur í hesi vikuni, um alt gongur sum ætlað.

Arbeiðsloysi:

# Ein generell øking um alt landið

**– Torført er at siga í løtuni, hvat tað merkir, at smoltstøðir lata aftur. Tað gongur ein tíð, áðrenn vit síggja útfallið av hesum, sigur Lisabeth Gaardbo, stjóri á Arbeiðsloysisskipanini**

ARBEIÐSLOYSI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í samrøðu við Sosialin herfyri, segði Sofus Johannesen, nevndarformaður í Gjáarsmolti og bygdarráðsformaður í Gjáar kommunu, at smolt- og alivinnan er størsta bygdamenningartiltak í nýggjari tíð.

Nú fleiri smoltstøðir hava latið aftur, og virksemið á øðrum er minkandi, hava vit vent okkum til Lisabeth Gaardbo, stjóra á ALS og spurt hana, um arbeiðsloysið í smolt- og alivinnuni sæst aftur í tølunum hjá teimum.

– Tað er torført at siga í løtuni, hvat tað merkir, at eitt nú smoltstøðir hava latið aftur á smáplássunum. Hugsandi er, at flestu arbeiðsfólkini á útoyggj búgva á staðnum, men tað kann vera eitt sindur ymiskt, hvar tey búgva, har landafast er til tey størru økini.

Hon sigur, at gerast fólk arbeiðsleys og tilmelda seg hjá ALS, eru tey við í samlaðu tølunum.

– Men tað gongur ein tíð, áðrenn vit síggja útfallið av hesum.

### Arbeiðsloysi veksandi

Stjórin á ALS sigur, at tað kann vera torført at síggja eitt ávíst mynstur í tølunum yvir arbeiðsleys.

– Vit kunnu í hvussu er siga, at vit í seinastuni hava sæð ein tendens til eina generella øking í arbeiðsloysistølunum kring alt landið.

Hon vísir á, at tá ið tølini vórðu uppgjørd í desember, vóru umleið 700 fólk arbeiðsleys.

– Um einar tvær ella tríggjar vikur hava vit aftur nýggj tøl fyri januar.

Lisabeth sigur, at vanliga eru tølini yvir arbeiðsleys størri hesa tíðina av árinum enn annars, men tølini higartil í vetur eru heldur størri enn tølini fyri síðsta vetur.

– Jú, vit síggja ein tendens til eina generella øking um alt landið. Tó vóru tølini fyrst í desember ikki hægri enn somu tíð í 2001, sigur stjóri á Arbeiðsloysisskipanini, Lisabeth Gaardbo.

*– Tað er torført at siga, hvat tað merkir fyri arbeiðsloysistølini, at smolt- og alivinnan eru í kreppu. Ein tíð gongur, áðrenn vit síggja útfallið av hesum, sigur Lisabeth Gaardbo, stjóri á ALS*





# Gamla urgan farin á ellisheim

**Gamla urgan í Sørvágs kirkju er farin á ellisheim. Soleiðis heilt bókstaviliga. Hon er tikin niður og sett upp aftur á ellisheiminum í Miðvági. Nýggj urga verður sett upp í Sørvágs kirkju komandi vikurnar**

KIRKJUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Gamla urgan í Sørvág kirkju sær ikki út av nógvum, har hon nú stendur í samkomuhøllini á ellisheiminum í Miðvági. Men hon ljóðar framvegis væl*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Sørvágs kirkja fær nýggja urgu frá Frobenius. Gamla urgan er niðurtikin og sett upp aftur á ellisheiminum í Miðvági.

Soleiðis er verðsins gongd, at tá elli tekur at boyggja, verður ein tikin úr tænastu, og um væl vil til, sleppur ein á ellisheim.

So heppin var gamla urgan í Sørvágs kirkju, sum Ellis- og Avlamisheimið í Vágum hevur fingið rættiliga lagaliga, nú sørvingar fáa nýggja urgu í kirjuna.

Torkil Haraldsen, kirkjuráðsformaður í Sørvági, sigur, at nýggj urga fyri eina knappa millión krónur verður sett upp í Sørvágs kirkju komandi vikurnar.

Urgan, sum er donsk, er bygd hjá Frobenius, og er komin til Føroya. Hon liggur í løtuni í eini bingju í Sørvági og bíðar eftir tveimum fólkum frá verksmiðjuni, sum suldu koma til Føroya mánadagin at seta hana upp. Arbeiðið fer væntandi at taka einar tvær, tríggjar vikur, sigur Torkil Haraldsen.

Nýggja urgan hevur sjey røddir. Hin gamla hevði fýra, greiðir kirkjuráðsformaðurin frá.

Gamla urgan var lítil í vavi, og tann nýggja er heldur ikki so øgiliga stór, sigur hann. Av praktiskum orsøkum, tí plássið á kirkjuloftinum í Sørvági er ikki so stórt. Urgan er so stór, sum plássið loyvir, ella væl tað, greiðir Torkil Haraldsen frá. Hon fyllir loftið, og fer at stinga eitt sindur út um verandi loftsgólv. Løgd verður ein stálpláta undir tann partin, sum røkkur inn í skipið. Um neyðugt verða stuðlar settir undir.

Nýggja urgan í Sørvági verður goldin við peningi, sum savnaður er saman til júst hetta edamálið. Spart er saman av kirkjuskattinum seinnu árini, sigur Torkil Haraldsen. Eisini er stuðul fingin úr Kirkjugrunninum, sum á leið svarar til meirvirðisgjaldið fyri uguna, sigur hann.

Gamla urgan, sum er komin til Sørvágs áðrenn 1965, var í ávísan mun merkt av aldri, sigur kirkjuráðsformaðurin í Sørvági. Ellisheimið fekk hana aftur fyri at taka hana niður og flyta hana til Miðvágs.

Hendan urgan er eisini donsk, og ein onnur av sama merki er, sær vitandi, í Føroyum, sigur Torkil Haraldsen. Hon stendur í Ebenezer í Havn, sigur hann.

# Kunningarleiðarin fer úr starvi

**Kunningarleiðarin í Vágum fer úr starvi hálvan ferbuar. Nýggjur leiðari er enn ikki settur**

VINNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** Leiðarin á Kunningarstovuni í Vágum hevur sagt seg úr starvi. Hann fer úr starvinum um hálvan februar.

Terji Nielsen, hevur í umleið eitt ár verið í starvi sum leiðari á Kunningarstovuni hjá felagnum Vágum. Umframt leiðarin er hálvtannað fólk í starvi á Kunningarstovuni og Kunningardiskinum á flogvøllinum.

Verandi kunningarleiðarin fer um hálvan februar í starv sum blaðmaður á Sosialinum.

Terji Nielsen hevur ikki so nógvar viðmerkingar til skiftið, aðrar enn, at hann fyrr hevur verið blaðmaður á Sosialinum, og honum hevur av og á longst aftur eftir slíkum starvi, sigur hann.

Hann hevur seinnu árini búð í Dnanmark, og fór beinleiðis í starvið sum kunningarleiðari í Vágum, tá hann í fjør flutti heimaftur.

Terji Nielsen býr í Havn, og hann dylur heldur ikki fyri, at eitt starv nærri bústaðnum eisini hevur okkurt við skifti at gera.

Niels Olgar Joensen, formaður í Felagnum Vágar, ið rekur kunningarstovuna, váttar, at kunningarleiðarin er farin úr starvi. Hann sigur, at enn er eingin endalig avgerð tikin um, hvussu nú verður við starvinum, men at tosað hevur verið um eitthvørt í hesum sambandi.

Niels Olgar Joensen sigur, at ein fundur verður nakað skjótt, og har verður helst tikin avgerð um, hvussu nú verður gjørt.

Niels Olgar Joensen sigur, at nakað væl av tíð og orku er brúkt at fáa kunningardiskin á flogvøllinum at virka, nú Felagið Vágar hevur yvirtikið hann. Og tað gongur bara heilt væl við tí, sigur formaðurin í Felagnum Vágum.

Fráfarandi kunningarleiðarin sigur, at Kunningarstovan í Vágum í løtuni arbeiðir við at skipa fyri einum oyggjarfundi, har evnið verður tann nógv umrødda kommunusamanleggingin. Avgjørt er tó ikki enn, nær hesin fundurin verður, sigur hann.



*Kunningarleiðarin í Vágum, Terji Nielsen, hevur sagt seg úr starvi. Hann fer hálvan februar í starv sum blaðmaður á Sosialinum, har hann at byrja við fer at skriva ítrótt*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Kavaveður

**Góða kavaveðrið, sum verið hevur seinnu dagarnar, tykist fara at halla. Í góðveðrinum mánadagin vóru bæði børn og vaksin úr Sóljugarði í Sandavági úti og spældu sær í kavanum**

KAVI
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Sandavági:** Gott kavaveður hevur verið nú eina tíð, og tí hava bæði børn og vaksin hugnað sær við.

Mánadagin var framvegis sera gott kavaveður í Sandavági, og bæði børn og vaksin í dagstovninum Sóljugarði hugnaðu sær í kavanum uttan fyri. Gott er økið uttanum, og frálík brekka er at skeiða á. So rimiligt er, at har hava børnini hildið til hesar dagarnar, kavin hevur ligið.

Í sólskininum av klárum himni vóru eisini tey vaksnu, sum arbeiða í dagstovninum, vorðin sum børnini aftur og tóku ein túr á sleðuni saman við teimum smáu.



*Bæði børn og vaksin stuttleika sær í kavanum*

*Mynd Edvard Joensen*